## UTTAN ÚR HEIMI

Búskapur og vinna:

## DONG skal samstarva

Hóast almenna danska oljufelagið DONG hevði sítt næstbesta úrslit nakrantíð í fjør, eru kapitalkrøvini so stór, at felagið noyðist at finna sær eitt altjóða felag at samstarva við.

DONG hevði í fjør 2,2 mia. krónur í avlopi, men stjórin, Anders Eldrup, sigur at hetta er lítið í altjóða høpi, og at felagið eisini munar sær lítið á altjóða oljumarknaðinum. Tað hevur verið umrøtt at skráseta felagið á partabrævamarknaðinum, men sjálvur heldur stjórin, at tað hevði verið ein størri fyrimunur at samstarva við einum stórum altjóða felagi.

Tað er staturin, sum eigur DONG, og tí er tað í síðsta enda stjórnin, sum skal gera av, um felagið skal fara upp í samstarv við eitt av teimum stóru feløgunum í altjóða oljuvinnuni.

## Røkke kærir dóm

Norski ríkmaðurin Kjell Inge Røkke skal rinda teimum smáu partaeigarunum í felagnum Aker RGI 362 mió. norskar krónur. Tað avgjørdi tingrætturin í Oslo mikudagin, men Røkke boðaði í gjár frá, at hann hevði gjørt av at kæra dómin.

Málið byrjaði, tá Kjell Inge Røkke í februar í 2000 noyddi teir smáu partaeigararnar í Aker RGI at selja síni partabrøv. Sjálvur setti Røkke virðið á hvørjum partabrævi til 105 krónur, men tað vildu teir smáu partaeigararnir ikki góðtaka. Teir stevndu tí Røkke og kravdu at fáa staðfest, at tað veruliga virðið á partabrøvunum var væl oman fyri tað, sum Røkke hevði ásett. Samstundis kravdu teir endurgjald fyri tað mista virðið.

Mikudagin segði tingrætturin í Oslo, at tað veruliga virðið á partabrøvunum var 166 krónur, og at Røkke tí skal gjalda teimum smáu partaeigarunum 362 mió. norskar krónur afturat.

# Mugabe spælir við eld

**Andstøðuleiðarin í Zimbabwe, Morgan Tsvangirai, er nú formliga ákærdur fyri landasvik**

ZIMBABWE
*Árni Joensen*

Leiðarin í zimbabwisku andstøðuni, Morgan Tsvangirai, varð mikudagin formliga ákærdur fyri landa svik. Sama ákæra varð samstundis reist ímóti einum øðrum andstøðupolitikara, tjóðartingsliminum Renson Gasela.

Flokkurin hjá Tsvangirai, MDC, hevur víst ákærunum aftur og sigur, at flokksleiðarin bleiv lumpaður av monnum hjá loyniligu zimbabwisku løgregluni, sum høvdu fingið til uppgávu at forða fyri, at Tsvangirai kundi vinna forsetavalið ímóti Robert Mugabe.

Ákærumyndugleikarnir grunda ákæruna um landasvik á eina sjónbandsupptøku. Upptøkan vísir ein mann, sum eftir øllum at døma er Tsvangirai, í einum orðaskifti um, hvussu Mugabe skal ruddast av vegnum.

Sjálvur sigur Morgan Tsvangirai, at upptøkan er klipt og falsað. Tað er komið fram, at tað var ein fyrrverandi embætismaður hjá ísraelsku fregnartænastuni Mossad, sum skipaði fyri upptøkuni, og at hann fekk pening frá stýrinum hjá Mugabe afturfyri.

Bretska samveldið Commonwealth gjørdi týsdagin av at útihýsa Zimbabwe í eitt ár sum mótmæli ímóti forsetavalinum, sum sambært altjóða eygleiðarum var óregluligt.



*Morgan Tsvangirai, andstøðuleiðari á veg úr rættarhølinum í Harare mikudagin, eftir at hann var ákærdur fyri landasvik*

*Mynd: Reuters*

Politiskir eygleiðarar siga, at við at ákæra sín harðasta mótstøðumann fyri landasvik hevur Mugabe valt at fara í álop heldur enn at verja seg ímóti teimum nógvu skuldsetingunum um valsvik og harðskap í sambandi við valið. Hetta er Mugabe so líkt, men eygleiðararnir eru samdir um, at hesaferð spælir zimbabwiski forsetin við eld.

# Reyðu Brigadurnar komnar afturíaftur?

**Tað er spurningurin, sum nógvir italiumenn seta sær, eftir at ein ráðgevi hjá stjórnini varð myrdur týsdagin**

ITALIA
*Árni Joensen*

Morðið á professaran og ráðgevan hjá italska arbeiðsmálaráðnum, Marco Biagi, týsdagin hevur skakað alt Italia, og tilburðurin hevur fingið politikarar og italiumenn yvirhøvur at minnast tær nógvu og blóðugu atsóknirnar, sum yvirgangsfelagsskapurin Tær Reyðu Brigadurnar skipaðu fyri í Italia í sjeytiárunum.

Enn hevur eingin átikið sær ábyrgdina av morðinum á tann 52 ára gamla Biagi nærhendis heimi hansara í býnum Bologna, men løgreglan í Bologna ivast ikki í, at morðið er ein fráboðan um, at Tær Reyðu Brigadurnar eru komnar afturíaftur.

Løgreglan vísir á, at drápshátturin týskvøldið var júst tann sami, sum drápsmenninir hjá brigadunum plagdu at nýta. Offurið fekk tvey skot í nakkan. Harafturat høvdu drápsmenninir rist eina fimmhyrnta stjørnu í portrið hjá Biagi, og sambært løgregluni plagdu limirnir hjá brigadunum í Bologna at nýta ta fimmhyrntu stjørnuna sum sítt eyðkenni.

Italsku myndugleikarnir seta morðið týskvøldið í samband við eitt annað morð, sum var í 1999. Eisini ta ferðina var tað ein ráðgevi hjá stjórnini, Massimo D'Antona, sum varð myrdur, og tá átóku Tær Reyðu Brigadurnar sær ábyrgdina av morðinum.

Úr Norðurlondum:

## Bergen besta havnin

Fimm reiðarí, sum reka ferðamannasigling í Atlantshavinum, hava valt Bergen sum ta bestu javnina í Norðurevropa. At Bergen er væl umtóktur, sæst eisini í yvirlitinum hjá havnarskrivstovuni. Har sæst, at í 1998 vóru 138 skipavitjanir Bergen, og at talið í fjør kom upp á 195.

Í ár vænta teir í Bergen, at heldur færri skip fara at leggja at har, tí færri amerikanarar fara at ferðast eftir tað, sum hendi tann 11. september í fjør. Kortini kunnu teir á havnarskrivstovuni fegnast um, at "Queen Elizabeth" hevur biðið um bryggjupláss í summar, og at 30 onnur skip, sum eru størri enn 50.000 tons, hava biðið um pláss í ár. Í fjør vóru hesi skipini bara 14.

Men tey størstu ferðamannaskipini sleppa ikki til Bergen. Askøy-brúgvin er so lág, at tey størstu skipini fáa ikki siglt undir henni.

## Pengatrot

Sjúkrahúsfelagsskapurin í Keypmannahavn, sum umfatar øll sjúkrahúsini í høvuðsstaðarøkinum, er í fíggjarligum trupulleikum. Blaðið Dagens Medicin skrivar, at felagsskapinum tørvar 700 mió. krónur nú, og at tørvurin verður ein mia. krónur um fýra ár. Felagsskapurin hevur sambært blaðnum biðið kommunurnar, sum eiga sjúkrahúsini, um hjálp, men hevur ikki fingið svar.

## Russar hjálpa

Í Norðurnoregi er stórur tørvur á læknum og tannlæknum, og tá norskir læknar og tannlæknar heldur vilja arbeiða longur suðuri í landinum, hava kommunurnar valt at leita sær hjálp úr Russlandi. Mánadagin byrjaði tann fyrsti russiski tannlæknin í Troms, og nú verður roynt at fáa fleiri russiskar læknar og tannlæknar at koma vestur um markið at arbeiða.

# hygg & hoyr



**Frá fríggjadegi 22. mars til hósdagin 28. mars**

## Nógvar nýggjar tónleikaupptøkur á páskaskránni hjá Útvarpinum

Sum vanligt hevur útvarpið nógvan tónleik á skránni páskadagarnar, og í ár verða fleiri nýggjar upptøkur at hoyra.

Skírisdag kl. 15 fara vit at spæla upptøku frá Studentaskúlanum í Hoydølum. Næmingar á skúlanum settu upp modernaða sangleikin Godspell fyri 14 døgum síðani, og hetta vóru sera væleydnaðar framførslur. Útvarpið festi framførsluna á band, og skírisdag fara vit at senda eitt úrdrag úr Godspell.

Kl. 17 skírisdag verður aftur ein nýggj upptøka at hoyra. Tann 17. mars hevði Føroya Symfoniorkestur konsert í Norðurlandahúsinum, og sum vant tók útvarpið konsertina upp. Vit hoyra brot úr tí upptøkuni við tónleiki av millum annað Mendelssohn, Händel og Vivaldi.

Eisini langa fríggjadag verður onkur nýggj upptøka á skránni. Fuglafjarðar Sangkór hevði konsert í kirkjuni í Fuglafirði leygardagin 16. mars, og fríggjadagin kl. 16.45 fara vit at spæla burtur úr tí upptøkuni.



*Ólavur Jakobsen*

Páskadag fara vit millum annað at hoyra Ólav Jakobsen spæla klassiskan guitara. Hann helt konsert í Fuglafirði og í Havn í mars mánaða, og útvarpið festi konsertina í Norðurlandahúsinum tann 13. mars á band. Ólavur Jakobsen, sum er okkara fremsti klassiski guit-arleikari, framførir bæði europeiskan og suðuramerikanskan guitar-tónleik.

2. páskadag fara vit at hoyra eitt sindur av nýskrivaðum jazzi. Norðurlendska trioin GRISFO er samansett av tónleikarum í Grønlandi, Íslandi og Føroyum – haðani navnið. Jim Milne úr Grønlandia klaver, Sigurður Flósason úr Íslandi á saxofon og Edvard Nyholm Debess úr Føroyum á bass fara at spæla eina skrá av sera vælljómandi jazz-tónleiki, sum útvarpið tók upp á konsert í Norðurlandahúsinum 3. mars.

Annars verður eisini nógvur annar tónleikur á skránni. Petur Birgir Petersen fer at hava eina sending um Matthæus-passiónina hjá J. S. Bach. Tann sendingin kemur páskadag kl. 15 og Kári Olsen fer at hava eina sending við oratoriinum hjá Ludwig van Beethoven – Kristus á Oljufjallinum. Tann sendingin er langa fríggjadag kl. 15.

## LISA fyllir 20, sær dupult og er skirv!

*Bergur Rasmussen ummælir:*



Mentanarálitið er komið! Og LISA fyllir 20 ár. – Tað er sum um tilvildin hevur lagt hetta sera hegnisliga til rættis. – Í hvussu er hava programleiðararnir í Út- og Sjónvarpi víst hesum samanfalli ans. – Mentanin hevur fingið pláss í føroysku loftmiðlunum hesar seinastu vikurnar henda fimbulsvetur, ið ongan enda fær. – Ein taxaførari vildi vera við, at kavin legðist á Tollaksmessu, og tað hevur næstan ikki verið tátt síðan. Mundi tað vera í Heimabeitinum hann segði so? Meg minnist ikki rættiliga. – Vit eru í hvussu er mong, ið leingjast eftir at sleppa at murra sangin hjá George Harrison aftur: Here Comes The Sun! Men eftir tí Alix segði í morgunsendingini leygardagin, so kunnu vit ikki gleðast ov tíðliga, sjálvt um fyrsti várdagur fyri langari tíð síðan er farin aftur um.

Leingi er annars tað, ið væl skal vera! – Í Stýrivoltinum fyri viku síðan, hevði Birgir Kruse viðtal við fólkalívsfrøðingin Eyðun Andreassen, og vísti Eyðun á eina tjúgu ára gamla grein, har tey vóru nøkur, ið gjørdu vart við, at man átti at orða ein føroyskan mentanarpolitikk. – Nú er hann so orðaður, og takk fyri tað. – Spennandi verður so at síggja um tað fer at føra til nýggjar sendingar, tí hóast eg persónliga ikki hevði sæð nakað serliga nógvar av teimum mentanarsendingum, Sjónvarpið hevur endursent í síðstuni, so gjørdi tað einki, um vit fingu meiri enn bert eina Magnsending 14. hvønn dag!

Mær dámdi annars rættiliga væl tónlistarligu útsetingina av gomlum føroyskum barnasangum og rímum, Edvard Nyholm Debess hevði riggað til í sendingini Lívsmyndir, ið var send nú ein dagin. – At nakað so løgið sum ein psykodeliskur húgvutáttur, ið sameinti rútmuspælið á mest buldraligu Nico plátunum við gement rapp, og klipt saman í MTv stíli, (frá tá MTv enn var vert at hyggja at, sum hasin tónleikagesturin í sendingini Vikuskifti tók til), skuldi rigga so væl, er fínar greiðir.

Men lat okkum ikki leypa fram av!

Mentan er eitt vítt begreb! – Fyri nøkrum árum síðan, royndi onkur við skili fyri tí í eini útvarpssending at definera mentan og endaði við at siga, at alt egentliga er mentan. – Sjálvandi er tað nakað um tað, men so missir orðið mentan sína megi um allýsingin gerst so breið, at innihaldið hvørvir. – Markið millum mentan og undirhald kann t.d. vera hárfín. Sendingarnar hjá Peter Roach plaga at sjangra upp undir leygardagsdøgurðan í flestum føroyskum heimum, men sjáldan sum meiri enn meinaleyst undirhald. Tó nú leygardagin var øðrvísi, tí maðurin hevði evnað til eina minnissending um mæta countrysangaran Harland Howard (hopi eg havi fingið navnið rætt við!), ið eg, hóast eg kendi tey flestu løgini aftur, ongantíð hevði hoyrt gitan. – Hóast eg ikki eri tann stóri C&W fjepparin, so var tað næstan sum at blíva førdur inn í ein annan heim, soleiðis sum sendingin var bygd upp, og er tað ikki tað mentanin m.a. skal eitast at gera? Og so hatta prátið, Útvarpið hevði gjørt við mannin fyri árum síðani í sambandi við eina portretsendirøð um Patsy Cline. Slík prát gera allar tónleikasendingar munin meiri áhugaverdar og átti prát at verið ein nógv størri partur av tónleikasendingunum, tí um tær ikki dámar tónleikin nakað serliga væl, so er ein góð frásøgn ikki at forsmáa. Kundi Útvarpið ikki manað fram aftur hasar kjaksendingarnar, ið sendar vóru fyri einum tveimum vetrum síðani? – Annars átti hin gamli country swingarin Harland Howard besta sitatið hesa vikuna: I've had the pleasure of not having an ordi-nary job for years! Ella segði hann decades?

Og mentan snýr seg eitt sindur um tað. – At hava eitt vanligt arbeiði, ið man kanska ikki trívist serliga væl í, ella at hætta sær at royna sítt flog á ein hvørjum mentunarligum øki, hugurin og hegnið er til. Tað royndi pottamakarin á heygnum mikla í hvussu so er!

Er samanburður kundi eisini verið gjørdur við forvitnisligu sendingina, ið var gjørd rundan um frumframførsluna av Symphony no. 1 hjá Sunnleif Rasmussen — Oceanic Days. Har viðgingu foreldrini, ið sanniliga vóru errin av avrikinum hjá soninum, at tey høvdu havt síni fyrivarni, tá ið hann av fyrstan tíð fortaldi teimum, at hann ætlaði at satsa upp á eina karrieru sum komponistur. Og so hava tey jú ein son aftrat, sum er skald, til lukku við tí!

Hvar gongur so markið millum fína mentan og platt undirhald? — Botnurin hjá Jens Marna og Tróndi høvdu tey flestu helst koyrt í tann seinna bólkin, men hinvegin so er ivasamt, um teir við at nevna sendingina soleiðis vænta sær aðrar reaktiónir. — Áseyðaroytingin fyri opnum skermi er í hvussu er so deiliga tápulig, at hon so avgjørt er stuttlig, og vit treingja øll til at smílast við hvørt, nú veturin ikki vil sleppa hvørkratakinum.

– Er tað bara eg sum havi eitt stutt minni, ella passar tað, sum fleiri siga, at vit mestsum einki summar høvdu í fjør?

Eitt lítið PS til síðst: Tillukku við herðaklappinum Hans. Tað er tær væl unt! Tú hevur í hvussu er rætt: Mentan flytir ikki nógvar atkvøður!

## Gekkur



svf Fríggjakvøldið kl. 20.45

## 32 mánaðir í Sachsenhausen 1:2



Skírisdag kl. 14.15

## Anders And i Mexico



Mánamorgun kl. 6.40

## Aladdin



Hósmorgun kl. 6.40